# Níðingssinnið

**UMMÆLI** *Gandaringurin* eftir Sigurd Hoel er søgulig skaldsøga, krimisøga, samfelagslýsing og tekstur um skyld og bót. Sum listaverk er hon ein tindur í norðurlendskum skaldskapi.



Hanus Kamban



### Upplýsing og miðøld

Hávarður Geirmundsson, høvuðspersónurin í skaldsøguni *Gandaringurin* eftir norska rithøvundin Sigurd Hoel, er bóndasonur úr Telemørkini. Tá ið skaldsøgan tekur við, er hann beint komin til ein landspart nakað væl "longur norðuri" í Norra, hevur gift seg við einkjuni Rannvá og sett seg niður á Olstaði, einum tí ríkasta garðinum í Norðurbygdini. Hávarður er væl skøddur til sín nýggja setning, hann hevur gingið á landbúnaðarskúla, hevur praktiskar royndir frá síni tíð sum fyristøðumaður á garðinum hjá Thurmann presti og er annars maður við hugflog og ætlanum.

Hendingarnar fara fram í tíðini um 1820-30, ofta verður sipað til kríggið í 1814, og til tann gitna prædikumannin og pietistin Hans Nielsen Hauge. Viðhaldsmenn hjá hesum seinna hava ein ávísan leiklut í bókini, av ikki bara uppbyggiligum slag.

Tann bygd, hesin ljósi upplýsingarmaður hevur vígt sína orku og sína framtíð, er í øllum lutum hansara mótsetningur, húsmenn og húskallar latir, ódugnaligir og undirbrotligir, bøndurnir lítið frægari, stórbøndurnir grammir jarðormar og búravnar. Afturhaldssemið er rótfrekt, og tá ið avbygdarmaðurin varisliga fer at bróta upp úr nýggjum, lýsa allar reyðar lampur í miðaldarinnar støðuhyli. Hakar og kvíslir úr jarni? Men eitrar jarn ikki moldina? Eplir? Men eru tey ikki vandamikil? Og var tað Guds ætlan, at menniskjan skuldi velta eplir, tiansheldur eta tey? Sama ger hvat hesin maður finnur uppá, allastaðni rennur hann seg í mótvilja og mistrúgv.

Í eini góðari skaldsøgu verða ofta, eftir klassiskari fyrimynd, at kalla frá byrjan pílar lagdir inn í tekstin, sum vísa fram ímóti einum mynstri ella vevnaði. Frá *Gandaringinum* kann ein, sum dømir um slíkar ábendingar, nevna dreymarnar hjá Hávarði, har hann villist í mjørka á ókendum leiðum og ættarkvæðið um Vilamann, sum "reið seg í bjørgið blá", og hvørs gangari "snávar um villistrá". Lesarin heftir seg eisini við, at sjálv bygdin ikki sjáldan liggur í skaddu, meðan hagin og skógurin í erva - har veiðimaðurin Jón, tann stolti og frælsi og reinlynti, hevur sína gongd - liggja í ljósi.

### Kristafár og tey øru

Tann mótstøða, Hávarður stendur yvirav, er eitt skrímsl við mongum høvdum. Hansara versti mótstøðumaður er, so tykist ið hvussu er, Kristafár á Bergi, bóndin og kraddarin, sum píkar seg upp av at hava øll tey øru í bygdini í einum kjallara, har tey sita, mong teirra leinkjað, upp undir øklar í sínum egna skarni. Kristafár hevði ætlað sær Rannvá og hennara garð og kann ikki fyrigeva Hávarði, at hann, tann fremmandi, her var við yvirlutan.

Men hóast Hávarður og Rannvá ta fyrstu tíðina liva saman í kærleika og hava eitt ríkt ástarlív, eigur bygdin eisini rót í henni, og tá ið Hávarður ætlar at keypa nýggj amboð og reint sáðkorn, vil hon, hóast hon umframt garðin eigur væl av pengum, ikki rinda fyri tað. Men Hávarður, sum er ráðasnildur maður, ger ein handil við stjóran á Verkinum, og tað eydnast honum at keypa smærufræ, ogna sær neyt av betri kyni, keypa harvu og fáa plógv til láns.

*Gandaringurin* er bók við mongum brigdum, ørgrynni av motivum, kompleksum vevnaði og heimspekiligum og sálarfrøðiligum mótsagnum. Men fyrst og fremst er hon fyrimyndarliga væl fortald, og frásøgnin verður, sum tú lesur, meira og meira spennandi, alsamt fyndugari og meira eirindaleys, til ein móti endanum kennir suðið frá tí sublimt orðaða sorgarleikinum.

Søgan um, hvussu Hávarður umskapar Vátlendið til sín besta jarðarteig, er samstundis ein frásøgn um eitt nýtt slag av veitargrevstri við taktum grótrennum, sum liggja undir flagi. Lýsingin av ítøkiligum menniskjansligum skittføri er minnilig. Tann sálarfrøðiliga lýsingin av menniskjansligum óndskapi er djúptøkin. Mitt í henda frásagnarvevnað hevur Sigurd Hoel sett ein persón, sum, við dygdum og veikleikum, er so sannførandi kveiktur, at lesarin heldur seg altíð hava kent hann. Ein yrking eftir Regin Dahl, "Minni maður" eitur hon, rennur einum í huga:

*Droymdi tú um at drepa*
*hann, ið leyp fyrstur um ánna?*
*Hann, ið altíð ló,*
*tá ið harðast á stóð?*

*Hann ið fekk gentuflokkin at piprast*
*av tráanarfrøi,*
*bara hann steig inn um gátt?*

### Glataðu seyðir Ísraels

Alt hetta hevði tó neyvan borgað fyri listarligum sigri, um ikki høvuðspersónurin eisini hevði allegorisk drøg. Tí Hávarður er ikki bara barn av hugsunarhátti, sum spratt úr heimspekini hjá Holberg og Voltaire, hann er samstundis úr ævinligari tilfari, hann er bjargarin, komin út í armóðina og myrkrið til "glataðu seyðir Ísraels" eins og ein annar kendur maður, sum hann er javngamal við at kalla, tá skaldsøgan byrjar.

Tey spor, sum vísa á hetta samsvar, eru týðilig, her kann bara

---



Regin Ekhólm

## Kjak

Habilitetsdilemma í Skúlabókagrunninum:

# Fakligan førleika ella babbasa atlas – kvilkin skulu vit velja?

Tað fyrsta føroyska heimsatlassið kom í 1993. Tað var/er merkt av manglandi fakligum stringensi og villleiðandi málsligum ad hoc loysnum, og nú talan er um at flyta hesar somu manglar yvir í tað nýggja atlassið, flýtur bikarið yvir hjá okkara fakligu geografum.

Í Kringvarpinum (28/2) varð lisið upp úr eini áheitan frá 10 av okkara geografum, har teir í einum skrivi til Skúlabókagrunnin staðiliga heita á leiðsluna, um at brúka fakligt vit og skil, tá nýggja heimsatlassið verður gjørt, og ikki at gera teir somu basalu feilirnar, sum eru í útgávuni frá 1993. Hesi 10 fakfólkini hava universitetsførleika í geografi og drúgvar royndir gjøgnum arbeiði, undirvísing og gransking. Tey hava í fakinum geografi eina fakliga tign, sum letur teimum trimum í Skúlabókagrunninum, sum annars standa fyri útgávuni av tí nýggja heimsatlassinum, nógv eftir at ynskja. Áheitanin frá teimum 10 geografunum er eisini ætlað føroyska almenninginum og stendur at lesa í bløðunum.

### Málslig broytingartíð - farvæl nationalpurisma

Tann nógva skrivingin í bløðunum um heimsatlassið vísir, at fólk eru ikki sørt ørkymlaði um ta stóru óvissu, sum valdar á økinum. Ikki minst á tí málsliga økinum er nógv hent síðani 1993. Tann nýggja Málnevndin v/ Jógvan í Lon Jacobsen sum formanni, hevur eina heilt aðra nútíðar fatan av málinum enn tann meiri nationalpuristiskt orienteraða nevndin, sum ráddi fyri borgum í 1993. Henda nýggja Málnevndin gongur millum annað inn fyri, at okkara alfabet verður normaliserað og fær bókstavirnar c, q, w, x og z upp í. Hetta broytir munandi um støðutakan til hvussu vit doypa og stava øll heimsins lond og ríkir!

Í fjør fingu vit á fyrsta sinni eina autoriseraða ella løggildaða Staðarnavnanevnd v/ Eivind Weyhe sum formanni. Eisini henda nýggja Staðarnavnanevndin hevur í verki víst, at tey taka ikki undir við tí stívrendu purismuni, sum annars eyðkendi málnevndina frá 1993 men at tey hinvegin vísa meira atlit til tað vanliga siðbundna føroyska málbrúkið og tykist at slóða fyri somu smidligu kós sum Málnevndin, við støði í tí faktuella føroyska móðurmálinum. Henda grundleggjandi broytingin í tí málsliga ráðandi hugburðinum, sum endurspeglast í báðum